

# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 6
November 2010

ISSN 1603-0036

*Stóra Dímun*
Mynd: www.faroephoto.com

**Fýra nýggjar frímerkjaútgávur**
**Útgávuætlanin fyri 2011**
**Ársins endasøla**

Posta
FAROE ISLANDS

# Altjóða kvinnudagurin 100 ár




FO 700 Royndarprent

Fyrstu spírarnir til kravið um líkarætt millum menn og kvinnur vóru sáddir í 18. øld. Frammanundan høvdu verið spjaddar røddir, m.a. *Christine de Pizans*, sum í 1405 talaði at kvinnufíggindaliga samfelagnum og førdi fram, at kvinnur og menn høvdu somu sálarligu eginleikar. Men tað var ikki fyrr enn hugskotini í upplýsingartíðini um mannarætt og krøvini um almenna politiska, sosiala og fíggjarliga ávirkan, at kravið um líkarætt fyri kvinnur varð sett fram.

**Fyrsta bylgjan**

Tað tók tó hálva øld til veruligur stuðul kom aftanfyri krøvini. Í tíðini tá ídnaðarkollveltingin stóð í vøkstri vóru sosialu umstøðurnar hjá vanligum fólki uttanfyri vit og skil og góvu ikki yvirskot til stríð um líkarætt millum kynini. Men í seinnu helvt av 19. øld komu umfatandi politiskar og sosialar broytingar, og fleiri og fleiri kvinnur gjørdust varar við teirra egnu støðu í samfelagnum og tey væntandi rættindini. Nú fóru kvinnur at taka seg saman um kravið um grundleggjandi rættindi og kravdu løgfrøðiligan, fíggjarligan, politiskan líkarætt og rættin at útbúgva seg á jøvnum føti við menn.

Fremsta kravið var tó atkvøðurætturin. Í 1893 og 1902 høvdu kvinnur í ávikavist Ný Sælandi og Australiu vunnið sær atkvøðurætt. Men bæði Evropa og USA vóru eftirbátar á tí økinum. Í Onglandi og USA tók sonevnda *suffragetturørslan* seg fram, ið kravdi atkvøðurætt fyri kvinnur, men mótstøðan var hørð. Á politiska pallinum ráddu menn fyri borgum og teir ráðandi høvdu ikki ætlanir um at lata kvinnur fáa ávirkan á tí økinum.

**Emmeline Pankhurst (1858-1928)**

Kenslan av at renna høvdið í ein múr gjørdist at enda ovmikið hjá summum kvinnum. Í Onglandi mistu t.d. partar av suffragetturørsluni tolið við tí forstokkaðu skipanini og fóru meira ítøkiliga til verka. Tær byrjaðu at órógva politiskar fundir, treingja inn í bretska tinghúsið og leinkja seg fastar, fara í hungursverkfall o.l. Myndin uttast til høgru á frímerkinum vísir eina av leiðarunum fyri hesa rørsluna, Emmeline Pankhurst, tá hon varð handtikin undir einari mótmælisgongu uttanfyri Buckingham Palace í 1914. Politiska ástøðið hjá Emmeline Pankhurst var upprunaliga sosialdemokratiskt, men á eldri døgum fór hon yvir til tey konservativu.

Hóast framferðarhátturin hjá Emmeline Pankhurst kann tykjast víðgongdur, verður hon roknað sum ein tann mest týdningarmikla kvinnan í kvinnurørsluni.

**Clara Zetkin (1857-1933)**

Hin kvinnan á frímerkinum er eisini ein av undangongukvinnunum í kvinnurørsluni. Clara Zetkin var ein máttmikil sosialistiskur politikari í Týsklandi. Hon var upprunaliga virkin í sosialdemokratiska flokkinum SPD, men flutti seg seinni longur til vinstru og fór upp í kommunistiska flokkin KPD. Á sínum eldri døgum var Zetkin limur í týska ríkisdegnum, og tað var hon sum, í sínum eginleika sum aldursforseti, í síni setanarrøðu í 1932 heitti á týska fólkið at stríðast móti vaksandi national-sosialismuni. Tá Hitler tók valdið í 1933, rýmdi Clara Zetkin til Sovjetsamveldið, har hon doyði sama ár.



Emmeline Pankhurst
verður handtikin í London, 1914

Clara Zetkin var alt lívið virkin á kvinnupolitiska frontinum, og í 1907 gjørdist hon leiðari av kvinnuskrivstovuni hjá SPD. Í 1910 varð Zetkin vald sum framsøgukvinna í Altjóða Sosialistiska Kvinnufelagnum, og tað var tá hon á eini kvinnuráðstevnu í Keypmannahavn sama ár, mælti til at stovna Altjóða Kvinnudagin.

**Kvinnudagurin**

Árið eftir, í 1911, varð fyrsti Altjóða Kvinnudagurin hildin í fýra londum: Danmark, Eysturríki, Sveis og Týsklandi. Hetta var tann 19. mars og krøvini vóru kvinnuligur atkvøðurættur, betring av arbeiðsumstøðunum hjá kvinnum og rætturin til almenn størv. Fyrstu árini aftaná varð dagurin hátíðarhildin ymsar dagar, men í 1921 varð avgjørt at leggja hann 8. mars. Í tjúgu- og tríatiárunum varð dagurin serliga hildin sum ein sosialistiskur kvinnudagur, og eftir annan veraldarbardaga fall hann meira ella minni burtur.

**Onnur bylgjan**

Í fýrati- og fimtiárunum hendi ikki stórvegis á kvinnupolitiska frontinum. Men í sekstiárunum fekk kvinnurørslan aftur vind í seglini. Nú fóru kvinnur undir eitt meira miðvíst arbeiði fyri at betra um kor og rættindi hjá kvinnum. Har undangongukvinnurnar um aldarskiftið mest høvdu lagt seg eftir valrætti og grundleggjandi rættindum, kravdi man nú fullkomna frígering og líkarætt millum kynini. Kvinnurørslan broytti grundvøllin í vesturheiminum og var største framstig fyri kvinnur nakrantíð á sosiala, intellektuella, politiska og einstaklinga støði.

Nýggja kvinnurørslan innførdi aftur 8. mars sum altjóða kvinnustríðsdag í 1974. Í samband við altjóða kvinnuárið í 1975, ásetti ST eisini 8. mars sum altjóða kvinnudag.

Kvinnustríðið er ikki av enn. Tað er enn munur á umstøðunum hjá monnum og kvinnum, bæði í okkara parti og restini av heiminum. Grundleggjandi rættindi, sum líka løn fyri líka arbeiði, javnstøða í arbeiðslívinum, politisk ávirkan, atgongd til útbúgving og rætturin at ráða yvir egnum lívi, eru bara nøkur dømi um øki, har kvinnur enn ikki eru javnsettar við menn. Men vónandi heldur stríðið fram, bæði 8. mars og restina av árinum.

Anker Eli Petersen






FO 701-702 Royndarprent

# Gomul kvinnuyrki

**Jarðarmóðir – ljósmóðir**

Tá talan er um gomul kvinnuyrki, man jarðarmóðirin teljast millum tey elstu. Frá aldardøgum hava royndar kvinnur hjálpt burðarkonum. Har, eins og í øðrum kunnleikakrevjandi størvum, hava tað verið ávísar konur í fólkabólkinum, bygdini ella nærumhvørvinum, ið meira ella minni hava havt tað sum starv.

Í Føroyum hava vit hugtakið "*nærkona*", um kvinnur ið vóru til staðar og hjálptu til tá kona átti. Hettar vóru kvinnur ið høvdu ávísar royndir viðvíkjandi barnsburði, men uttan kunnleika, um okkurt skuldi gingið galið. Tá tær útbúnu jarðarmøðurnar komu, virkaðu nærkonurnar ofta sum hjálparfólk, ella tóku sjálvar móti barninum, um jarðarmóðirin ikki kom fram í rættari tíð.

Í skriftunum "*Indberetninger fra en Rejse i Færøe 1781-1782*", skrivar Jens Chr. Svabo, at tað vóru jarðarmøður á oyggjunum um tað mundið, men at teimum væntaði fakligan kunnleika. Hann skeyt upp at føroyskar jarðarmøður skuldu útbúgvast í Danmark, men hvørt hettar veruliga hendi, er óvíst.

Seint í 19. øld, fóru fleiri føroyskar kvinnur til Danmarkar at læra til jarðarmóðir. Afturkomnar á klettarnar, settust tær niður ymsastaðni á oyggjunum og høvdu hvør sítt ábyrgdarøki. Tá áttu so at siga allar kvinnur heima, og jarðarmóðirin skuldi tí altíð vera til reiðar at fara til barnakonurnar at taka ímóti børnunum. Umstøðurnar at ferðast tá á døgum vóru sera ringar, og tað finnast mangar ógvusligar søgur um jarðarmøður ið fóru um fjøll ella yvir um fjørð í regni og ruski og kavaódn. Tað eru enntá søgur um jarðarmøður, ið sjálvar gingu fullar upp undir hendur, men allíkavæl noyddist at fara út í ódnarveðrið at hjálpa øðrum kvinnum at eiga.

Miðskeiðis í sekstiárunum gjørdist vanligt at kvinnur áttu á føðideildunum á sjúkrahúsunum í Havn, Klaksvík og Tvøroyri. Hettar lætti um hjá jarðarmøðrunum og var tryggari fyri barnakonurnar, um teimum tørvaði læknahjálp.

Vit hava valt at vísa tvær kendar føroyskar jarðarmøður við børnum tær hava tikið ímóti. Fyrra er *Ebba Wiberg*, ið fram til seinast í sjeytiárunum var jarðarmóðir í Suðuroy. Hin er *Astrid á Rógvu*, sum alt sítt virkna lív var jarðarmóðir í Danmark, m.a. í Søborg, har hon hevði sína egnu føðistovu.

**Sjúkrasystir**

Júst sum jarðarmóðirin, hevur nútímans sjúkrasysturin røtur langt aftur í tíðini, til siðbundna leiklutin hjá kvinnuni sum sjúkrarøktarin í ættini. Fyrr í tíðini var ikki so langt



Rigshospitalets Jordemoderskole 1931
Mynd: Karl Kirkholm

millum viðgerð og røkt, og í flestu grannaløgum hava verið fólk, serliga kvinnur, ið høvdu ein ávísan kunnleika til leking og røkt.

Í miðøld tók ein ávís skipað sjúkrarøkt seg upp á kleystrunum í Evropa, har munkar og nunnur tóku sær av sjúkum og veikum fólki. Kleystraverkið savnaði eina rættuliga umfatandi vitan um sjúkrarøkt, men við trúbótini í sekstandu øld vóru munkar og nunnur rikin úr kleystrunum, og hetta førdi til munandi afturstig í sjúkrarøktini í teimum protestantisku londunum.

Í tíðini eftir trúbótina var sjúkrarøktin á teimum fáu evropisku sjúkrahúsunum røkt av óútbúnum stovukonum, og ikki fyrr enn í fyrru helvt at nítjandu øld kom skil aftur á røktina av sjúklingum. Tá byrjaði *Diakonnissustovnurin* í Týsklandi, har serliga ógiftar kvinnur úr borgarastættini vóru lærdar upp í sjúkrarøkt.

Í 1860 lat hin navnframa *Florence Nightingale* upp sjúkrasystraskúlan The Nightingale School í London, partvíst inspirerað av diakonissurørsluni. Hesin skúli gjørdist grundin undir nútímans sjúkrarøktarfrálæru.

Samstundis sum læknavísindin mentist í stórum, vaks eisini tørvurin fyri fakligt útbúnum starvsfólki í sjúkrarøkt. Seinast í nítjandu øld fóru tey undir at útbúgva sjúkrasystrar í Danmark, og eftir trýsti frá m.a. *Dansk Sygeplejeråd*, ið var stovnað í 1899, varð sjúkrasystraútbúgvingin ríkisgóðkend í 1933.

Í Føroyum mentist sjúkraviðgerð og røkt eitt sindur seinni enn í Danmark. Eftir at "*Landskirurgen*", ið sat í Tórshavn, í øldir hevði verið einasti lækni í Føroyum, varð ein fylkislækni settur í Suðuroy í 1852. Í 1872 varð lækni settur í Klaksvík, ið røkti Norðoyggjar og eystaru bygdirnar í Eysturoy, og í 1883 kom lækni til Vestmanna, ið tók sær av vestaru oyggjunum, Norðstreymoy og Norðeysturoy.

Aldargamla sjúkrahúsið á Argjum, ið serliga hevði virkað sum koloni fyri fólk við líktrá,




Astrid á Rógvu, ljósmóðir
Mynd: Karl Kirkholm

spitalskusjúku, varð í 1829 avloyst av *Færø Amts Hospital* ið lá við Skarpholið í Lágabø í Havn. Hetta sjúkrahúsið varð brúkt til tað varð avloyst av *Dronning Alexandrines Hospital* í 1924. Í 1898 varð sjúkrahús bygt í Klaksvík, ið røkti Norðoyggjar. Í 1904 varð eisini eitt sjúkrahús bygt á Tvøroyri. Hesi trý sjúkrahúsini eru síðan útbygd so við og við og virka tann dag í dag. Í 1908 varð harafturat tuberklasanatoriið í Hoydølum bygt, og hetta varð brúkt til byrjan av sekstiárunum.

Sum vera man, gjørdist tørvur á skikkaðum sjúkrasystrum ítøkiligur, tá sjúkrahúsini komu. Fyrsta útbúnað sjúkrasystir í Føroyum var diakonissan *Mette Cathrine Thomsen*, ið arbeiddi í Tórshavn frá 1897 til 1915, mest á Færø Amts Hospital. Tað vardi ikki leingi fyrr enn fleiri útbúnar sjúkrasystrar komu, og tað gjørdist vanligt at ungar føroyskar kvinnur nomu sær útbúgving í fakinum. Í 1960 varð sjúkrasystraskúlin á Landssjúkrahúsinum settur á stovn, sum eisini kundi taka sær av øllum tí ástøðiliga partinum.

Umframt at virka á sjúkrahúsunum, komu onnur sjúkrasystrastørv innan heimasjúkrarøkt, eldrarøkt, skúlasjúkrarøkt o.s.fr.

Á frímerkinum hava vit valt at seta tvær myndir saman av Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Bakgrundsmyndin er frá 1919. Maðurin í songini er ungi norðmaðurin *Monrad Jacobsen*, ið var fyri álvarsomum løsti, tá hann lossaði kol frá einum norskum dampara til hvalastøðina á Fossánesi á Borðoynni. Kvinnan vinstrumegin er *Elsebeth Fr. Malena Johansen* f. 1887. Kvinnan høgrumegin, í sjúkrasystrabúna, er helst *Oluffa Bærentsen*, sum um tað mundið var yvirsjúkrasystir á Sjúkrahúsinum.

Kvinnan á fremru myndini, hon við barninum, var ein av kendastu andlitunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. *Petra Oluffa Jensina Fredrikka Hansen* varð borin í heim tann 24. oktober 1895, ein mánaða eftir at faðir hennara gekk burtur við *Bikuben*. Hon varð uppkallað eftir manningini, harav tað langa navnið. Um tað mundið varð Klaksvíkar Sjúkrahús bygt og mamma hennara, *Marianna Joensen* arbeiddi har alt sítt lív. Tá Petra vaks til, arbeiddi hon eisini á sjúkrahúsinum og móður og dóttur vórðu tí kallaðar *Marianna og Petra á Sjúkhúsinum*. Petra, sum varð ógift, var sostatt alla sína tíð á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Anker Eli Petersen





# Lutakast um royndarkav og túrar við Norðlýsinum

**Føroyska náttúran er gudanna kalaidoskop**
Tekna teg til teldutøka tíðindabræv okkara á stamps.fo og verð við í lutakasti um royndarkav og túrar við Norðlýsinum næsta summar.

Føroyska náttúran lýsist ikki við orðum. Tú upplivir hana bara í smáum løtum í senn. Tí brátt, sum tú heldur teg hava fingið ein varhuga av hennara yndum, kann hon sveipa seg í heilt aðrar litir, sum bara finnast á dreymanna paletti. Tað er ótamdur vakurleiki.

Og nú hevur myndamaðurin, Ingi Joensen, víst okkum, at ongastaðni er vakurleikin størri enn undir vatnskorpuni. Ein ónomin heimur við yðjandi lívi og litum. Eitt sjálvsagt myndevni til frímerki okkara.

Sum Ingi sjálvur sigur, so eru Føroyar eitt satt kavaraparadís, sum ikki stendur aftan fyri nakað annað land.

Tú hevur nú møguleika at síggja hetta paradís ella fara ein hugtakandi túr við Norðlýsinum, sum vitjar nakrar av okkara vakrastu og mest áhugaverdu perlum kring landið summarhálvuna.

Les meira á
**www.stamps.fo**

Hefti við 8 sjálv-
klistrandi frímerkjum










FO 703-704

Royndarprent

# Kettur í Føroyum

*"Kettan liggur í durinum deyð, fær ikki etið sær smør og breyð."* Soleiðis byrjar føroyska skjaldrið um neyðars kettuna, sum ikki fær etið fyri harmi, tí hon ber ást í barmi. Vit vita ikki nær kettan kom til Føroya, ella hvussu nógvar kettur eru í Føroyum, tí tær eru ikki skrásettar. Í føroysku søgukeldunum er lítið at finna um kettuna, men dómarafulltrúin E. A. Bjørk skrivar í bókini Færøsk bygderet, at tað í 1778 til 1779, doyðu nógvar kettur av kettupest.

Kettan hevur verið í samband við menniskju í fleiri túsund ár, og hon er í dag best umtókta kelidýrið í heiminum og í Føroyum. Ein grund er, at hon hóskar væl til modernaða liviháttin. Ketta krevur ikki nógva røkt, hon passar seg fyri tað mesta sjálv, og kann vera einsamøll. Ein kend ímynd er húskettan, sum sera fokuserað situr í vindeygakarmi, har hennara stóru mandluformaðu eygu í tímar eygleiða eitthvørt. Mangan hevur kettueigari forvitnast eftir tí, sum bara kettan sær har úti í náttúruni. Mong munnu eisini kenna ævintýrið um frensin við stivlunum. Hesin frensur er so mikið snildur, at hann megnar ikki mætari enn at skaffa fátæka eigara sínum bæði kongsdóttir og alt kongaríkið.

Føroyska húskettan er lítið djór, sum hevur broytt seg lítið frá villu kettuni. Henni dámar best at eta, sova og spæla. Hon tolir væl hita, elskar sólina og náttina, er sera reinlig og fim og av tí sama sigst altíð at lenda á beinunum. Húskettan er blandað rasa. Hon hevur stuttan pels, oftast í fleiri litum og mynstrum við onkrum hvítum á. Svørt og hvít ketta er sera vanlig, eins og reyð og hvít, brún, einlitt, flekkut og stríput. Í Føroyum eru serliga rasukettur við síðum pelsi sum norska skógkettan, heilaga birmaðin, Main Coon og persarin.

Ketta kann sigast at fáa tær heilt stóru kenslurnar fram í fólki. Summi ræðast kettu so mikið, at tey sansa hana, áðrenn tey trína inn í eitt hús, og onnur nokta at koma inn í



Frensurin *Findus*
Mynd: Miriam Hinz

hús, har ketta heldur til. Í miðøldini varð kettan sett í samband við tað dulda og ónda, og svartar kettur vóru settar í samband við heksir og dripnar. Í gamla Egyptalandi vóru kettur hinvegin heilagar og dyrkaðar sum gudar. Í norðurlendsku gudalæruni  er Freyja, gudinnan fyri kærleika, vakurleika og fruktbari, myndað ríðandi á einum vogni, drigin av tveimum kettum. Summi halda, at hesar kettur eru forfedrar hjá norsku skógkettuni.

Ketta vekir ymsar kenslur í fólki, tí hon hevur sítt heilt egna karismatiska torgreidda lyndi. Hon er kelin, blíð, trúgv, eyðmjúk, men eisini snild, lúrin, forherðað og hástór. Sum kendi sálarfrøðingurin *Sigmund Freud* segði, er tað aldrin burturspilt, at nýta tíð saman við kettu. Hon kann elta teg ein heilan dag fyri at venda tær rygg næsta dag. Hon kann dríva teg øran við kvøld eftir kvøld at stara í tímar eftir tær við sínum granskandi eygum, fyri síðan at hvørva fyri tíni ásjón í dagar. Samstundis er tað sonn sálarbót, tá ein livandi samanrullað pelspolstrað hitapúta gevur sær góðar stundir at hvíla á tær, og kínir sálina við sínum friðsæla murrandi sangi. Tað munnu vera fá, sum ikki fella fyri bønandi stóru djúpu eygunum á einum lítlum rundum dúnutum kettlingi, - ella fyri vandamiklu fittu eygunum á frensinum við stivlunum í teknifilminum *Shrek* - og tá ið hesi eygu hyggja djúpt inn í teg, fært tú eina hóming av, at tey royna at siga tær satt. Hevur ein ketta í hesi stund avgjørt at elska teg, er tað ikki tað stóra, sum tú kanst gera við tað. Tú eigur ikki kettuna, men fært loyvi at verða í hennara lívi og í besta føri, eigur hon teg. Ketta hevur verið fastur partur av lívinum hjá mongum húskjum og hevur givið børnum sum vaksnum mikla gleði, júst tí hon er, sum hon er. Sum renæssansu listamaðurin Leonardo Da Vinci segði, er sjálvt tann minsta kettan eitt meistaraverk.

*Durita L. Jóansdóttir*




FO 705-707 Royndarprent

# Annika í Dímun

Annika í Dímun beindi fyri manni sínum og fekk sær ein húskall til elskara. Fyri hetta fekk hon deyðarevsing, men setti menn at ansa eftir og verja uppgongdirnar í Dímun, so hon ikki skuldi vera tikin. Teir vardu oynna í trý ár, til ein av monnunum sveik, og hon varð tikin og druknað á vánni í Havn.

Tað er óvist, hvør Annika í Dímun var. Søgnin sigur, at hon var dóttir sýslumannin og systurdóttir prestin á Sandi. Tað kann hon hava verið, men um slagið var fínt, var tað kanska ikki so ógvuliga gott, tí ein søgn sigur, at pápi hennara setti hana í veð í kortspæli og tapti. Tá var hon trúlovað øðrum drongi frammanundan, men noyddist til Dímunar. Er tað rætt, ber til at skilja, at hon kann hava havt hug hevna seg inn á mannin, men um hon hevur gjørt tað, er ein heilt annar spurningur.

Í 1664 var ein *Anna Isaksdatter* druknað á Havnarvág. Hon var dømd fyri blóðskemd, sum í hennara føri var at hava átt leysingabørn við tveimum monnum, ið vóru brøður.

Jakob Jakobsen heldur, at hetta er Annika í Dímun, men søgnin sigur einki um blóðskemd, og ræþturin sigur einki um, at Anna Isaksdatter hevði beint fyri manninum. Kortini kann Jakob Jakobsen hava grein í málinum, tí so álítandi eru sagnir sjáldan, at ikki okkurt kemur skeivt fyri. Deyðarevsing var galdandi í Føroyum í 1600-talinum, so tann parturin kann vera ræþtur.

Sagnirnar veita ikki pápanum stóran heiður, og tykjast at vilja hava samhuga við Anniku. Ikki bert spældi hann hana burtur í kortum, men spottaði hana illa. *"Hvønn stakkin skal eg fara í?"* spyr hon pápa sín, tá hon skal førast til Havnar. Tað lá sektin á, skuldi hann svara, hon var ikki boðin í brúdleyp!

At søgnin hevur samhuga við henni, skilst eisini av umsorganini fyri soninum. Tá ið




Tvær uppgongdir eru í Dímun, onnur fyri eystan og onnur fyri vestan, og tveir menn vóru settir til at verja hvør sína kleivina.

Í trý ár vardi hon oynna og forðaði øllum, bæði øvrigheit og øðrum, uppgongu; men umsíðir sveik annar kleivverjin hana.

Kelda: *Jakob Jakobsen: Færøske folkesagn og æventyr, 1898-1901*

menninir fóru av stað við henni, rópaði hon, at ikki mátti takast frá soninum tað, hon var von at geva honum hvønn morgun: eina tint av náttróma.

Tað er merkisvert, at kvinnan í søgnini stendur púra einsamøll móti fleiri monnum: pápa sínum sýslumanninum, manni sínum dímunarbóndanum, elskara sínum, ið ikki vardi oynna nóg væl og ikki minst formanninum hjá teimum, ið koma at taka hana. Ein søgn er, at hetta var bróðir hennara, og at hann fekk eftirgivið egna deyðarevsing, um hann kom við systrini.

Tað gekk illa at søkkja Anniku niður. Hon fleyt á sínum stóra hári, og ikki fyrr enn flætturnar vórðu kliptar av henni, eydnaðist at drukna hana. Søgnin ger hana soleiðis fría í útsjónd, kærleiksfulla í sinni móti soninum, men illa svikna av teimum, ið hon átti at kunna líta á. Ein tung lagna at fáa.

Eyðun Andreasen

# Útgávuætlan 2011

## 21. februar

### Altjóða kvinnudagur 100 ár

- eitt leyst merki. Í 2011 eru 100 ár liðin síðan fyrsti altjóða kvinnudagur varð hildin. Anker Eli Petersen legði til rættis. Virði: 10,00 kr. FO 700.




### Gomul kvinnuyrki

- tvey einkultmerki, ið lýsa gomul kvinnuyrki - jarðarmóðir og sjúkrasystir. Anker Eli Petersen legði til rættis. Virði: 6,00 og 16,00 kr. FO 701-702.






### Kettur

- tvey frímerki. Edward Fuglø hevur teknað. Eitt frímerkjahefti við átta sjálvklistrandi frímerkjum verður somuleiðis givið út. Virði: 6,00 og 10,00 kr. FO 703-704.






### Annika í Dímun

- smáark við trimum frímerkjum, ið lýsa søgnina um Anniku í Dímun. Edward Fuglø legði til rættis. Virði: 3 x 10,00 kr. FO 705-707.




## 26. apríl

### Europa 2011: Skógir

– tvey einkultmerki. Fotomyndir úr viðarlundunum í Kunoy og úr Havn. Anker Eli Petersen legði til rættis. Tvey postkort verða somuleiðis givin út. Virði: 10,00 og 12,00 kr. FO 708-709.






### Bjargablómur

- tvey einkultmerki við tekningum av bjargablómu og sortugrasi eftir Astrid Andreasen. Virði: 14,00 og 20,00 kr. FO 710-711.





## List: Bergithe Johannessen

- tvey einkultmerki við málningum eftir Bergithe Johannessen. Virði: 2,00 og 24,00 kr. FO 712-713.







## List: Frida Zachariassen

- tvey einkultmerki við málningum eftir Fridu Zachariassen. Virði: 6,00 og 26,00 kr. FO 714-715.







# 28. september

## Sepac 2011: landslag

- eitt leyst merki. Fotomynd av føroyskum landslagi. Virði: 10,00 kr. FO 716.




## Ellisakfør

- smáark við trimum frímerkjum. Edward Fuglø teknar. Verður somuleiðis givið út sum trý einkultmerki. Virði: 3 x 12,00 kr. FO 717-719.

## Jólafrímerki

- tvey einkultmerki, sum ímynda aðru røð av jólasangum. Anker Eli Petersen legði til rættis. Eitt hefti við átta frímerkjum og tvey postkort verða eisini givin út. Virði: 6,00 og 10,00 kr. FO 720-721.DKK.







## Postgjaldsmerki 2011

Fýra postgjaldsmerki.
Myndevnið er enn ikki avgjørt.

# 7. november

Árbók, ársmappa (290,00 kr.) og jólamerki.
Myndevnið á jólamerkjunum er ikki avgjørt.
*Gevi gætur! Útgávuætlanin kann broytast.*

Posta
FAROE ISLANDS

# Ársins endsøla !

Hin 31. desember 2010 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.




FO 578-587



FO 591-598




FO 588-589




FO 590



FO 601-603




FO 599-600




FO 607-614

# Árbók 2006






FO 616-617

# Ársmappa 2006




FO 615




# Heftimappa 2006




# Fdc-mappa 2006



# Nýggjar frímerkjaútgávur - 21. februar 2011



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Altjóða kvinnudagur 100 ár** |
| Útgávudagur: | 21.02.2011 |
| Virði: | 10,00 kr. |
| Nummur: | FO 700 |
| Frímerkjastødd: | 40,00 x 30,00 mm |
| Snið: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé, Holland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Kvinnuyrki** |
| Útgávudagur: | 21.02.2011 |
| Virði: | 6,00 og 16,00 kr. |
| Nummur: | FO 701-702 |
| Frímerkjastødd: | 40,00 x 28,50 mm |
| Snið: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja: smábrøv 0-50 g og miðalbrøv, 101-250 g. Evropa: miðalbrøv 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Kettur** |
| Útgávudagur: | 21.02.2011 |
| Virði: | 6,00 og 10,00 kr. |
| Nummur: | FO 703-704 |
| Frímerkjastødd: | 35 x 35 mm |
| Snið: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | OeSD, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og smábrøv til Evropa, 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Annika í Dímun** |
| Útgávudagur: | 21.02.2011 |
| Virði: | 3 x 10,00 kr. |
| Nummur: | FO 705-707 |
| Frímerkjastødd: | 46 x 31 mm |
| Aarksnið | 105 x 61 mm |
| Snið: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Southern Colour Print, Ný Sæland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 g |

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: Centraltrykkeriet, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo